


# Lívið er annað enn pylsur og vatnrevolvarar

**Angela og Hannebal hava í 9 ár hugtikið børn og ofta eisini vaksin. Men hvat fjalir seg handan smyrsl og leiktjøld og hvussu nógv arbeiði liggur í leiklutinum sum barnavinur nummar eitt í Føroyum? Og hvussu ávirkar hetta gerandislívið? Vit hava hitt Angelu í morgun, meðan hon gjørdi seg klára til enn eina framførslu, ið verður á Summarfestivalinum í kvøld**

SAMRØÐA
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*
*Myndir: Dagfinn Olsen*
*Grafikkur: Jón T. Einarsson*

Í 9 ár hava Angela og Hannibal verið ogn Føroya fólks. Øll kenna tey og soleiðis hevur tað verið, síðani tey byrjaðu at undirhalda saman á palli og síðani í sjónvarpi.

Men hvussu er tað at gerast kendur? At fara frá at vera Angela Petersen til at vera tann Angela, sum øll kenna og børnini elska?

Vit hava hitt Angelu, sum hósdagin fyrireikaði seg til enn eina framførslu, nevniliga á Summarfestivalinum í Klaksvík. Klokkan er júst farin av 9 hósmorgun og vit fáa ein heitan kaffimunn, meðan Angela greiðir frá.

– Eg eri smaðin. Men tá eg komi í føðingardagar til dømis, so vænta fólk sær unidrhald, hóast eg helst bert vil lurta og ikki vera so nógv frammi. Har fara fólk helst skeiv av mær. Sjálv síggi eg hetta við undirhaldinum nokk meira sum eitt arbeiði. Men tað er tó ikki strævið at heilsa uppá børn og siga hey, men tað strævna og torføra liggur í at finna uppá okkurt nýtt til framførslurnar, sigur Angela, sum ásannar, at hon í roynd og veru er heppin.

– Eg skal hugsa t.d. um at fáa børnini at gloyma upptøkutólið og tað kann vera trupult. Men eg vil so fegin hava øll við og ikki gera sum so manga aðrastaðni, har børnini vera roynd fyrst ella bara klipt burtur. Og tað er týdningarmikið at fylgja við í, hvat er frammi innan t.d. leikur. Ella bara tað at tosa um tenn. Fólk hugsa kanska ikki so nógv um tað, men tað fyllir nógv í barnatilveruni, sigur Angela, ið eisini ger mun á, um talan er um Fres, Angelu og Hannibal ella annað.

## Er hon muslimur?

Angela er útbúgvin pedagogur og er nú farin til Danmarkar at lesa sálarfrøði. Tað at búgva í Danmark hevur bæði fyrimunir og vansar, men er sera læruríkt, metir Angela.

– Tað er sera ymiskt, hvat er frammi í barnasjónvarpi niðri og tað, ið vit kunnu loyva okkum í Føroyum. T.d. vilja børn vita hvat vín er. Tað er trupult at taka upp í Føroyum, men børnini síggja tað tó á útlendskum sjónvarpsrásum, men bara



á øðrum tungumáli. Og eisini er mangt at síggja á teknifilmi, har tað ofta er so sum so við moralinum, sigur Angela.

– Tá Angela og Hannibal leggja tilrættis, so verður nógv arbeitt við spurninginum um, havt er rætt og hvat er skeivt. Børn vita sera væl og tey elska hendan leikin, ið gongur fyri seg. Leikluturin hjá mær, Angelu, er so at vísa á skilagóðu loysnina, men aftur her er stórur munur á, hvørt talan er um pall ella sjónvarp, sigur Angela.

– Tað er avmarkað hvat ein kann loyva sær í sjónvarpi og tí hendir tað lættæiga, at evnir ganga aftur og tað er slítandi. Tað undrar meg í roynd og veru, at vit hava hildið so longi, men tann dag eg kenni, at vit ikki hava meira at geva, so gevist eg beinanvegin, staðfestir Angela.

– Øll frítíðin fer til at hugsa um hvat kann nýtast á palli ella í sjónvarpi. Nógv tíð fer til at leggja tilrættis, men tað er so, at trupult er at venja, tí nógv má roynast. Ein má eisini taka til eftirtektar, hvørt talan er um lítil ella stór børn ella um stilla ella villa fjøld. Ein má altíð hava ein ætlan B. Men so kann henda, at okkurt als ikki riggar, ella at vit finna útav onkrum, sum visir seg at vera júst tað rætta, sigur Angela.

– Alt er umhugsað. Eg veit væl, at lívið er annað enn pylsur og vatnrevolvarar. og børn eru nú so von og góð við meg, at tey ofta siga mær ymiskt, sum bert er okkara millum, men tað er nú einaferð ikki alt, ið eg kann taka upp í eini sending sum Fres, og tað kann níva meg viðhvørt. Men tað er veruliga meira enn bert undirhald í øllum hesum, og ein álvarslig síða er eisini. Men barnalívið skal vera stuttligt, tó at álvarsligar løtur eisini eru, og tað kanska meira tann vegin eg nú fari, nú eg lesi sálarfrøði og byggi víðari á førleikan sum pedagogur, sigur Angela.

– Tað finnast nógv sløg av undirhaldarum og tað hendir nógv júst nú. Men ein hugsar viðhvørt um, hvat hendir, tá eg eri burtur úr hugaheiminum hjá børnunum? Fleiri hugsa ikki um hetta, men taka alt sum eina sjálvfylgju. Tey spyrja ikki aftur umaftur og summi gloyma enntá at gjalda fyri framførslur, hóast talan ikki er um stórar upphæddir. Men tá eg hugsi um tað, so er tað ófatiligt, sum vit eru lítið krevjandi, tí ofta tørvar okkum ikki pall ella mikrofon, men børnini elska tað vit gera. Vit hava heldur ongantíð avlýst, hóast sjúka ella ryggtrupulleikar hava gjørt um seg viðhvørt, sigur Angela um undirhaldaraparið Angelu og Hannebal, sum tó ikki eru par uttanfyri palløkið.

Síðani Angela flutti til Danmarkar hevur hon upplivað eitt sindur av rasismu og hevur hetta serliga verið síðani tiltiknu Muhammedtekningarnar komu fram.

– Eg eri ofta hildin at vera muslimur og havi fingið onkra skolu í bussinum ella tá eg eri til handils. Men so er tað eisini løgið at koma aftur til Føroya, tí valla eri eg komin á flogvøllin, áðrenn eg hoyri børn siga: Áhhh, hygg!! Angela!! Og so má eg minnast til at heilsa og práta, men eg gloymi ongantíð, at júst hetta veruliga er ein gáva, sigur Angela, sum fegnast um lívið í Danmark, har hon er meira ókend.

– Eg sleppi ofta alt ov lætt í Føroyum, tað er ein veruleiki. Men Føroyar er mítt land. Eg verði altíð Føroyingur og eg kenni meg sum føroying, hóast eg kanska ikki síggi út sum ein, sigur Angela skemtandi.

– Niðri í Danmark byrji eg á berum og tað er sunt og læruríkt fyri menniskju, sigur Angela, sum fegnast hvørjaferð hon kemur heim í arbeiðsørindum ella at vitja familju..

## Munur á

Angela sigur eisini, at munur er á at vera Angela og at vera Hannebal, tí hann er bara "á", tá smyrslið er á, meðan Angela alla tíðina er "á".

– Og tað er eisini so, at ger eg okkurt galið, t.d. blandi meg tá fólk kjakast um okkurt, so gerast fólk skjótt ovfarin og skilja onki av tí heila, tí tey vænta, at eg ikki havi eina meining um nakað, men bert eri barnavinurin Angela. men eg eri eisini ein vaksin persónur, minnir Angela á.

Niðri hava Angela og Hannebal, (ið bæði búgva niðri í lestrarørindum, blðm.), roynt seg sum undirhaldarar. Angela hevur eisini roynt ymiskt, sum hon ikki hevur roynt her heima og tað hevur gingið rætta vegin, hóast onki er ítøkiligt enn.

Um tilveruna sum føroyskur útiseti í Danmark sigur hon, at hon kennir tað, sum býr hon mitt ímillum.

Hon hevur roynt seg innan so mangt innan barnaundirhald og staðfestir, at hevði hon hildið ein støðg, so hevði tað tikið ár at bygt innlitið í barnatilveruna uppaftur.

Fyri nøkrum árum síðani fekk hon eisini altjóða viðurkenning í einum forum, har fólk innan barnasjónvarp savnast, men av ymsum orsøkum kom ikki meira burturúr hesum.

– Tað er stórur munur á at gera sjónvarp til børn og sjónvarp um børn. Sjálv geri eg heilt greitt sjónvarp til børn, og tað hugtók fólkini, ið lótu mær viðurkenningina, metir Angela.

Hon metir eisini, ay børnini eru nógv broytt hesi árini, ið Angela og Hannebal hav verið frammi.

– Í byrjanini vildi ongin siga nakað, tá upptøkutóli fór frá, men nú vilja øll við, sigur Angela.

## Nýtt show

Tey bæði arbeiða nú við nýggjum framførslum og Hannebal gerst alt meira vandamikil og hann svølgjur nú svørð og tílíkt. Og staðfestir Angela, at útgerðin nú er blivin meira kostnaðarmikil. Tey bæði arbeiða eisini við nýggjari sjónvarpsrøð, ið er øðrvísi, enn tað vit áður hava sæð frá teimum.

– Børn spyrja eisini ofta, hvussu tað er at vera Angela og Hannebal, tí tey undrast, sigur Angela, sum fegin heilsar børnum, tá tey hittast, men hinvegin kann tað heldur vera tey vaksnu, ið taka alt sum givið.

Um leiklutin sum barnavinur nummar eitt í Føroyum sigur Angela stutt og greitt:

– Stuttligt og gevandi er tað í øllum førum!

## Summar Festivalurin á Rás 1

Televarpið sendir næstu dagarnar sending um Summar Festivalin. Tosað verður við fólk um festivalin, og aktuellur tónleikur verður í sendingini, sum verður víst fýra ferðir um dagin. Fyrstu ferð í dag kl. 12.15

Um vikuskiftið verður Summar Festivalurin hildin í Klaksvík, og Televarpið spennir seg út við serligari sending um festivalin. Næstu dagarnar ber til at síggja ein forvitnisliga sending um festivalin á Rás 1 hjá Televarpinum.

Í sendingini verður tónleikur við aktuellu bólkunum spældur, og tosað verður við bæði fyriskipara og onnur fólk um festivalin.

Sendingin verður send hvønn dag frá í dag og fram til týsdagin. Sendingin verður í luftini fýra ferðir um dagin:

Kl. 12.15, kl. 16.15, kl. 19.15 og kl. 21.15